# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Sansir hava fingið nýggjan stjóra



Lena L. Mohr hevur tikið við sum nýggjur stjóri í samskiftisvirkinum Sansum. Hon verður javnsett stjóri saman við Høgna Rasmussen.

Lena L. Mohr er útbúgvin cand. negot, sum er ein máls-lig og búskaparlig útbúgving, har dentur verður lagdur á samráðingar. Lena skrivaði høvuðsuppgávu um Danfoss og er serkøn í samskifti millum kyn og samráðingum millum starvsfólk og leiðslu.

Tað er komið Lenu væl við í hennari starvi. Lena byrjaði á Sansum eftir lokna útbúgving í 2001 og kom longu í 2002 við í leiðslubólkin. Hon hevur verið ráðgevi í marknaðarføring og samskifti og hevur havt ábyrgdina av nøkrum av høvuðskundum felagsins.

Í almenninginum er Lena L. Mohr mest kend fyri, at hon saman við øðrum á Sansum tók stig til blaðið Kvinnu, har hon hevur verið blaðstjóri, síðan fyrsta blaðið kom út í november 2004. Hon heldur fram sum blaðstjóri, nú hon verður stjóri á Sansum.

Sansir varð stovnað í 1997 sum eitt reklamuvirki. Í dag fevnir virksemið um mangt annað; høvuðsuppgávan er at framleiða kunning og marknaðarføring, sum er grundfest í mentanini hjá virkjum, stovnum og feløgum. Nýggja heimasíðuskipanin Sansir.net er ein umráðandi partur av virkseminum.

Lena L. Mohr hevur verið við til at ment Sansir til eina altjóða fyritøku. Starvsfólkatalið er tvífaldað eftir tveimum árum, ein deild er latin upp í Keypmannahavn, og starvsfólk búleikast eisini í øðrum londum. Í dag starvast umleið 30 fólk á Sansum.

Lena L. Mohr, sum er 37 ára gomul, er úr Fuglafirði og er dóttur Randi og Meinhardt Mohr.

## Altjóðagóðkent kavaraprógv



Hósdagin 21. september fingu tríggir næmingar altjóðagóðkent prógv sum kavarar frá kavaraskúlanum Faroe Dive.

Næmingarnir hava staðið royndir í ástøði og praktiskari kaving bæði í svimjihøll og ikki minst í sjónum. Onkur av næmingunum hava verið so hugtiknir av heiminum í sjónum, at teir hava ætlanir um at útbúgva seg enn meiri innan kaving hjá Faroe Dive.

Á myndini síggja vit næmingarnar eftir seinasta kavið á grundskeiðnum. Næmingarnir eru frá vinstru: Leif á Lava Petersen, Klaksvík, Jógvan Sámal Poulsen, Klaksvík og Signa Johannesen, Klaksvík.

*Hjartaliga takka vit…*



…tykkum øllum, sum á ymsan hátt gleddu okkum og gjørdu silvurbrúdleyp okkara minniligt fyri lívið.

**Kærastu heilsanir**

*Birna, Óli og børnini*

**Dagurin eitur Kleofas**
**25. september. Kleofas.** Annar av lærusveinunum, sum á veg til Emmaus hittu hin upprisna (Luk. 24. 13-35).

**Dagurin eitur Adolf**
**26. september. Adolf,** deyður umleið 824. Sonur muslimskan pápa og kristna móður í Sevilla. Flutti til Cordoba í vón um at hava kristnu trúgv sína í friði, men varð klagaður og tikin av døgum. Týskt navn ið merkir aðalborin, úlvur.

Lesið Sosialin

## Andlát og jarðarferðir

**Jastrid Østerø** andaðist á Klaksvíkar Sjúrkshúsi fríggjadagin, 64 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum heim í Christianskirkjuna í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður týsdagin klokkan 13.30. Tey, sum vilja minnast Jastrid kunnu lata eina gávu til KFUM og K í Klaksvík. Konto í Norðoya Sparikassa.

**John Hjelm**, ættaður úr **Vági**, búsitandi í **Rødovre**, andaðist leygardagin 23. september, 68 ára gamal.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá góði maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Jósup Henriksen**
Sørvágur

andaðist og varð jarðaður.
Takk fyri kransar, blómur og peningagávur til Sørvágs kirkju. Tøkk til David Johannesen, prest, og Jóhann Henriksen fyri góð orð, í kirkju og kapellinum.
Takk til sangarar, kirkjutænarar og gravarar.
Takk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum, og til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Katrin, Jóannes, Sigrið, Tummas og Bárður**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Kathrina N. Zachariassen**
ættað úr Streymnesi
búsitandi í Tórshavn

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til Bergur Debes Joensen, prest, fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravarar.
Tøkk til heimasjúkrasystrarnar og tykkum, ið vitjaðu hana á sjúkralegu hennara.
Tøkk til tykkum, ið hjálptu til í samband við jarðarferðina og við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir og til tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Jákup og Grækaris v/familju**